

*Stoltleikin er stórur um ítróttarfólkini, sum á Rhodos vunnu besta føroyska úrslitið nakrantíð*
*Mynd: Áki*

# Suðuroyingar stuttleikaðu sær á Rhodos

**Tit vísa, at suðuroyingar megna at vera ímillum tey bestu, men tað gerst best við samstarvi á øllum økjum**

MÓTTØKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað var stuttligt at vera suðuroyingur á oyggjaleikunum.

Tað helt Jógvan Krosslá, limur í mentanarnevndini hjá Vágs Býráði, tá ið vágbingar hildu móttøku at heiðra ítróttarfólkini , sum akkurát eru afturkomin av oyggjaleikum.

Hann sipaði sjálvsagt til, at tað høvdu verið so nógvur suðuroyingar ímillum ítróttarfólkið og at tey høvdu staðið seg avbera væl.

Hann segði, at tey høvdu víst, at suðuroyingar megna at vera ímillum tey bestu og tað vónaði hann, fer at vera lagið frameftir.

- Men tað gerst best við at øll feløgini í Suðuroy stuðla hvørjum øðrum og samstarva á øllum økjum, legði hann afturat.

Hans Joensen, sum er pápabeiggi Pál Joensen, fagnaði ítróttarfólkunum og helt, at tey høvdu tænt Suðuroy og øllum Føroyum heiður.

Men serliga fegnaðist hann um, at tey høvdu sett Suðuroy á Føroyakortið.

- Ein slíkan heiður, sum tit hava vunnið á Rhodos, er eindømi í suðuroyar søgu.

Hann gloymdi heldur ikki venjaran, Jòn Bjarnason, sum hann helt, átti æru av, at tey høvdu fingið so góð úrslit.

Á móttøkuni fingu suðuroyarfeløgini, sum vóru umboðað á Rhodos, eisini blómur frá svimjifelagnum í Vági og frá Vágs Býráði. Frá býráðnum í Vági, fekk Vágs Svimjifelag eisini 5000 krónur og hini suðuroyarfeløgini, sum vóru umboðað á Rhodos, svimjifelagið, flogbóltsfelagið og borðtennisfelagið á Tvøroyri, fingu 2000 krónur í part.

Frá bygdaráðnum í Sumba, fekk Vágs Svimjifelag eisini 5000 krónur.



*Nógv fólk varð komið á móttøkuna, sum Vágs býráð skipaði fyri*
*Mynd: Áki*

MARKNAÐARRÁK VIKA 28 2007

## RÁVØRUR Í FOKUS

Nú liggur partabrævamarknaðurin sum heild í friði og bíðar eftir hálvársroknskapunum, sum koma í næstum. Meðan vit bíða hava rávørupartabrøv tað gott. Oljuprísurin nærkast tí hægsta nakrantíð, og metallprísir hava verið støðugt høgir seinastu vikurnar. Oljuprísurin er komin upp á 76 dollarar fyri tunnuna, og nærkast alsamt toppinum á 78,6, sum hann var uppi á í august í fjør. Hann er hækkaður 25% síðan mars. Hendan hækkingin hevur verið við til at hækka kursin á oljupartabrøvum. Til dømis er Statoil hækkað 18% hesa tíðina, meðan Royal Dutch Shell er hækkað 25%. Prísirnir á gulli, silvuri eins og á ídnaðarmetallum sum stáli og aluminium hava stabiliserað seg, eftir at teir lækkaðu í mai og juni. Hetta hevur stuðlað kursinum á minufeløgum sum til dømis BHP Billition, sum er heimsins størsta av slagnum. Kursurin er hækkaður stívliga 40% síðan mars.

## NORSKA KRÓNAN STERKARI

Seinastu tríggjar vikurnar er norska krónan styrknað gott 1,5% mótvegis tí donsku, til 93,5 oyru. Hetta er í sær sjálvum ikki so øgiligt. Tað er kortini áhugavert. Hetta er fyrstu ferð síðan august, at hon er oman fyri 93 oyru fyri hvørja donsku krónu. Hækkandi oljuprísurin stuðlar væl undir norsku krónuni. Um hann heldur sær á leið á teimum 75 dollarum fyri tunnuna, hann er í løtuni, vænta vit at norska krónan styrknar til 96 oyru.

## LÁNSBRÆVARENTUR STØÐUGAR

Lánsbrævarenturnar eru enn støðugar. 10-ára rentan hevur seinasta mánaðin sveiggjað millum 4,58%-4,78%, og hon er í løtuni í ovaru helvt av hesum strekki. Marknaðurin venur seg við hesa høgu rentu og bíðar eftir onkrum, sum fær hana úr strekkinum.

## HESA VIKUNA

Hetta verður væntandi ein friðarlig vika á marknaðunum. Marknaðirnir fara væntandi at sodna hendingarnar í farnu viku, meðan eyguni verða havd við oljuprísinum.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1498,57 | + 2,86% |
| Alheims partabrøv | 8933,87 | + 1,22% |
| Atlantic Petroleum | 1091,00 | + 1,96% |
| Føroya Banki | 230,00 | -1,29% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,63 | + 0,55% |
| USD | 545,98 | -0,05% |
| JPY | 4,42 | -0,86% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK